# Bussleiðin skal røkjast og mennast

**ELIN LINDENSKOV**
Býráðslimur
Javnaðarfloksins í
Tórshavnar býráð



Bussleiðin í Tórshavnar kommun varð kosin "Besta átak 2008". Metingarnevndin segði m. a., at "Virðislønin verður givin fyri eitt serliga framskygt átak, sum fremur nýhugsan og er ein jalig fyrimynd fyri onnur".

Henda heiður eru vit í býráðsleiðsluni sera fegin um og stolt av. Tað er sera umráðandi, at vit framhaldandi røkja og menna Bussleiðina. Umframt at tað er ókeypis at koyra buss, hava vit økt um túratalið í Havn, úr tveimum upp í tríggjar ferðir um tíman. Næsta stigið má verða at økja um túratalið til Kollafjarðar, Kaldbak, Kirkjubø og Velbastaðar. Somuleiðis at endurskoða ferðaætlanina á kvøldi og í vikuskiftunum.

Í 2010 gongur verandi sáttmáli út, tí er umráðandi, at nývalda býráðið beinanvegin fer undir at endurskoða og fyrireika broytingar í skipanini.

Vit í Javnaðarflokkinum halda "kósina". Vit vilja framvegis hava Bussleiðina ókeypis og virka fyri, at hon røkkur út til allar borgarar í kommununi. Við eini vælvirkandi bussleið røkka vit somuleiðis málinum, um at minka um $CO_2$ útlátið til frama fyri eini reinari kommunu.

# Eina greiða og sterka rødd í býráðið!

**JÁKUP SÍMUN SIMONSEN**
á lista E



Eftir áheitan, og eina umhugsanartíð havi eg valt at stilla upp til býráðsvalið í Tórshavnar kommunu.

Orsøkin er tann, at eg havi altíð havt áhuga í samfelagsviðurskiftum og havi luttikið í ymsum felagsarbeiðum. Taki vanliga lut í orðaskiftum um samfelagspurningar manna millum.

Eg vil virka fyri eini støðugari menning av viðurskiftunum í kommununi við m.a:

- Framhaldandi útbyggingar innan ítróttar- mentanar- og skúlaøki
- Tryggari ferðsluviðurskiftir í kommununi, serliga við atliti við skúlar og fólk til gongu
- Á tal við vinnulívið í kommununi
- Fíggjarligt skynsemi

Saman byggja vit eina kommunu við einum sterkum altjóða høvuðsstaði - og við livandi bygdum og býlingum!

Eina greiða og sterka rødd í Tórshavnar býráð!

Hetta gera tú og **E** saman!

X við Jákup Símun Simonsen á lista E

# Vit hava eina møguliga loysn til ungdómin í Kollafirði

**LEVI MØRK**



"Lat okkum brúka Ítróttarhøllina í Kollafjørði til ungdómshús", hetta var ein lutakari skjótur at svara, tá ið vit høvdu valcafé/kjakfund í Café Chil´l í Kollafjørði í kvøld. Eitt av evninum ið vit umrøddu var trivnaðin hjá børnum og ungum í Kollafjørði.

**Tørvur er á ungdómshúsið:**

Tað var eisini fitt av ungdómi tilstaðar í Café Chil´l, tey vístu eisini á, at tørvurin var til staðar. Hetta var annars ein góður og konstruktivur fundur, har nógv gott kom fram frá bygadarfólkinum.

**Stórt pláss í ítróttarhøllini:**

Har kom eisini fram, at í Ìtróttarhøllini í Kollafjørði, eru tvey stór loft uppá 300 fermetrar í part.

Tey flestu fundarfólkini og valevnir hjá Javnaðarflokkinum vóru samd um, at her eru møguleikar við at brúka loftini í Høllini til ungdómin. Har tey føla, at hetta er teirra stað og við námsfrøðiligum eftirliti, sum eg fyrr havi skriva um í lesarabrævið, um støðuna.

Eg havi eisini fyrr sagt, at eg ætli mær, at gera nakað við málið, um eg verið valdur inn 11.11.08. Tann besta loysnin hevði verið, at bygdt ein nyggjan frítíðarklub, har frítíðarskúlabørn og ungdómurin kundi búðleikast. Tað sama vil eg arbeiða fyri í Hoyvík, við ætlani um ein frítíðarmiðdepil.

**Frítíðarskúlabørnini í Kollafjørði hava ikki góðar karmar:**

Frítíðarskúlabørnini í Kollafjørði, halda til í sera vánaligum karmun, saman við við barnagarðsbørnum. Í framtíðini skal byggjast nýggjur barnagarður og nýggjur frítíðarskúli.

Lat okkun halda fokus á ungdómin fyrst og brúka ítróttarhøllina til ungdómshús:

Men, lat okkum fyrst fara og hyggja uppá møguleikum fyri, at brúka Ítróttarhøllina í Kollafjørði til ungdómshús.

Hetta er ikki í lagið, at ungdómurin, skal vera identitetsleysur og flaksa ymsastaðni í bygdini. Nej hetta er eitt mál, sum skal takast upp beinavegin. Eg farið, at arbeiða víðari við sakini um eg verið valdur inn í Tórshavnar býráð. Tí eg brenni fyri sakini. Tit frætta aftur frá mær. Vel Levi Mørk, valevni á lista C

# Býráðsmeirilutin sveik Høllina á Hálsi

**ANNFINN BREKKSTEIN**
valevni á lista B



Tað sæst á Høllini á Hálsi baði innan og utttan, at hon ongan góðan hevur. Høllin verður brúkt nærum 24 tímar um døgnið, av ítróttarfólki í ýðkar innandura ítrótt. Høllin hevur alstóran týdning, serliga fyri hondbóltin, flogbóltin og fimleikin. Øll vit hava brúk fyri Høllini á Hálsi, hon hýsir skúlunum í dagtímunum, samkomunum ávis vikuskiftir, ja sjálvt vinnulívið leitar sær niðan í Høllina, ja hvør hevur ikki brúk fyri Høllini á Hálsi. Høllin hevur verið karmur um slóðbrótandi ítróttartiltøk, menturtiltøk, ella rættari sagt, hvat var Havnin uttan Høllina á Hálsi, hvat hevur hon ikki givið okkum?

Vit hava fingið frá býráðnum fleiri ferðir, at umfatandi umvælingar skuldi fara fram, so Høllin bleiv nútímansgjørd, eitt nú við einum venjingarbana eystanfyri. Hetta hevði givið møguleika fyri at tvey lið kunnu venja í senn. Hetta hevði bøtt munandi um tann ovurhonds stóra tørv sum hondbóltsfeløgini í havn hava. Hondbólturin og høllin á Hálsi eru afturúrsilgd og hava ringt við at vinna somu sømdir sum hini ítróttarfeløgini.

Høllin á "Hálsi" hevur enn einaferð tapt slagið um havnina, býráðið hevur svikið Høllina á Hálsi.

Hondbólturin hevur enn einaferð fingið eitt skot fyri bógvin. Tað er hugstoytt at síggja høllina fara sum hon ferð. Høllin hevur verið karmur um mangar spennandi hondbóltsdystir, landsdystir og ikki minst Europacupdyirnar sum fluttu okkum lang á leið, hvat hondbóltinum viðvíkur. Høllin hevur uppiborið at verða dagførd og nútímansgjørd.

Hetta verður eisini loyst tá vit aftur taka við leiðsluni í býráðnum.

# Gevið Tórshavnar býi ein nýggjan musikkskúla

**LÆRARARÁÐIÐ Í MUSIKKSKÚLANUM OG FORELDRABÓLKURIN**

Høli okkara eru niðurpínd og óforsvarlig.

So stutt kann tað sigast. Í meira enn 25 ár hevur Tórshavnar musikkskúli verið undir veingjabreiði Tórshavnar býráðs. Býráðið hevur altíð verið positivt og stuðlandi mótvegis musikkskúlanum, og tað eru øll, ið varða av, sera takksom fyri.

Næmingatalið er vaksið stútt og støðugt, soleiðis at tað í løtuni ganga 613 næmingar á skúlanum. 9 fulltíðar lærarastørv eru – tilsamans eru tey 41.

Hesi árini hevur musikkskúlin í Havn ment seg til eitt tónlistamentanarligt lokomotiv í føroyska samfelagnum, har frægastu rútmisku og klassisku tónleikarar landsins geva eitt stórt mentanarligt íkast til trivnaðin í høvuðsstaðnum, har ið tónleikarapisur ein fyri og onnur eftir, verða kleiktar.

Vit kunnu nevna tónleika-spælistovur, ymsu barnakórini, samstarv við studentaskúlan í Hoydølum um t.d.sangleikin "Hair", stóru harmoniorkestrini, miðnámsskeiðið, ið hevur vakt ans uttanlands fyri góð úrslit. Vit kunnu nevna tónleik fyri brekað og ta sera jaligu umboðanina, ið musikkskúlanæmingar hava í Havn og á ferðum uttanlands.

Alt hetta verður skapt í einum umhvørvi, ið als ikki er hóskandi, heldur ikki forsvarligt.

Undirvísing í tónleiki fer oftast fram sum einaundirvísing, og tað sigur seg sjálvt, at nú fer at tátta í, tí hølini eru so fá.

**Á Frúutrøð 1**. eru tey: 4 stovur í niðaru hædd og 5 undir vaðingini + GHM-hølið, sum kann lænast, tá ið GHM ikki nýtir tað.( Eisini skal nevnast, at í hesum 50 ára gamla barakkhúsinum heldur øll fyrisitingin hjá Tórshavnar kvøld- og ungdómsskúla til.)

**Skansastova** er miðdepil fyri alla rútmiska frálæru:

Hetta er eitt gamalt pakkhús við betongkjallara uttan vindeygu. Ovara hæddin er viður og bleytar eldfimar plátur. Eingin ventilatión og ongar neyðdyr. Luktar illa.

Felags fyri bæði húsini er: eingin ljóðbjálving, og í neyðstøðu slepst illa út.

Í hesum fáu hølum verða teir 613 næmingarnir undirvístir allar vikudagarnar.

Summir lærarar eru so illa kroystir, at teir rekast um á kommunalu skúlunum og enda við at undirvísa heima hjá sær sjálvum.

Nógv eru ljóðførini, t. d. læra 100 at spæla guitar, 175 klaver, 100 violin, 20 bass, 40 messingblástur, 50 klarinett, 40 sello, 50 tvørfloytu, og 50 blokkfloytu + nógv, nógv onnur.

Til teori ganga 420 næmingar, sangararnir eru 160 og síðan er at nevna orkestrini: Harmoniorkestrið, messingorkestrið, slagverksorkestrið, kamarorkestrið, Big band, symfoniorkestrið, guitarbólkar, og hesi hava øll fastar venjingartíðir.

Bíðilistin er endaleysur. Í løtuni standa 2.394 børn á hesum lista.

Vit eru vitandi um eitt gott øki á Lutzenstrøð, sum býráðið langtsíðani hevur nevnt sum møguligt øki til ein nýggjan musikkskúla. Eisini eru onnur støð nevnd.

Í næstum verður býráðsval, og her vilja vit – lærararáðið á musikkskúlanum saman við túsundtals foreldrum staðiliga heita á tykkum politikkarar um at arbeiða fyri okkara søk.

Býurin veksur við sjeymílaferð.

Fleiri kanningar hava langtsíðani staðfest, at tað at fáast við tónleik og annan kreativitet, fremur innlæringarevnini hjá børnum.

Haraftrat fyribyrgir tað kriminaliteti.